# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Sylla fór til Malta

**Toppskjúttin hjá B36 fer komandi hálva árið at spæla við liðnum, sum hann í fjør sendi úr Europa-Cup**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki minst Amed Davy Sylla fyri at takka, at B36 í fjør sum fyrsta føroyska felagið spældi seg víðari í Champions League undankappingini. Við tveimum málum í 3-0 útisigrinum á Birkirkara var Sylla høvuðsmaðurin aftan fyri milliónavinningin, sum B36 fekk úr kappingini í fjør, og tað var sjálvandi við til at økja um áhugan fyri ivorianska áleyparanum.

Ta ferðina hevði B36 tó lítlan hug at selja, og Birkirkara hevði ikki neyðuga peningin, um spælarin skuldi keypast leysur av sáttmálanum. Og ístaðin hevði Sylla í fjør sítt besta ár persónliga, og endaði hann eisini sum móttakari av gylta skógvinum fyri mál síni.




*Á Malta eru tey í Birkirkara fegin um, at Sylla nú skal skora fyri felagið heldur enn ímóti*

*Mynd: www.birkirkarafc.com*

Tað var tó um reppið, at Sylla als ikki kom til Føroyar. Persónligu umstøðurnar við eini familju, sum ikki treivst serliga væl í Føroyum, hóttu við at forða spælaranum at koma til landið, og tí mundu fá í B36 hava vónina um, at spælarin skuldi koma aftur til Føroya í 2008.

Og tað kemur hann so heldur ikki. Tollaksmessudag kundi Birkirkara boða frá, at felagið hevur fingið áleyparin í hópin hjá sær.

Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Sylla, sigur, at talan er um hálvt ára sáttmála, sum partarnir hava gjørt.

- Tað er eingin loyna, at Sylla hevði hug at royna nakað nýtt. Og við at fara til Malta verður talan uttan iva um heitari umstøður, enn hann er vanur við her hjá okkum.

# Dia hevur valt sínar menn

**Landsliðsvenjarin í hondbólti hevur boðað frá, hvørjar 17 spælarar hann tekur við sær til Serbia**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann 2. januar skulu Føroyar spæla hondbóltslandsdyst á útivølli mó Serbia. Dia Midjord, landsliðsvenjari, hevur nú gjørt av, hvørjar spælarar hann tekur við sær á ferðini.

***Spælararnir eru:*** Magnus Matras (Kyndil), Lars L. Black (Kyndil), Levi Nybo (H71), Ingi Olsen (VÍF), Karl Herup Olsen (Neistin), Josef Abrahamsen (Kyndil), Áki Olsen (VÍF), Sveinur Justinussen (tÍF), Dann Thorleifsson (Neistin), Heini Hanusarson (Elite 3000), Janus Einar Sørnsen (Kyndil), Hjalti Jacobsen (Kyndil), Rókur Akralíð (Elite 3000), Hans Áki Dal Christiansen (Kyndil), Dánjal Tórgarð (H71), Tróndur Kragesteen (Neistin)og Janus Sørensen (H71). Umframt Dia Midjord eru Kári Nielsen (hjálparvenjari), Jákup Durhuus (liðleiðari) og Tina Skjæris Jakobsen (fysioterapetur) eisini við á ferðini.

Eftir dystin í Serbia eiga Føroyar heimadyst móti somu tjóð, og verður hesin spældur 6. januar. 9. januar spæla Føroyar heimadyst móti Ísrael, og 12. januar er útidystur móti Ísrael. Báðir heimadystirnir verða spældir í Høllini á Hálsi í Havn.

# Tevez er bestur

**Sambært Actim Index, ið er almenna styrkismetingin av spælarum í enskum fótbólti, er Carlos Tevez hjá Manchester United besti spælari í Premier League higartil í ár. Eisini Rio Ferdinand og Cristiano Ronaldo eru at finna á topp-10-listanum**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tevez, ið um stutt fyri jól varð matchvinnari á Anfield móti Liverpool, hevur staðið seg framúr væl síðan skiftið frá West Ham United í summar. Nærum uttan at hava vant við nýggju liðfeløgunum varð hann blakaður í eldin, tá Luis Saha og Wayne Rooney drógust við skaðar. Síðan tá hevur Tevez ikki verið til at steðga.




*Carlos Tevez hevur alt fyri eitt staðfest sína støðu sum ein av bestu áleyparunum í Premier League*

*Mynd: Polfoto/AP*

Í 19+3 dystum hava hansara dygdir vunnið honum níggju fulltreffarar - sjey av teimum í Premier League. Hóast mongu málini, er tað hansara skil fyri spælinum, spæligleði, fantastiski arbeiðsmoralur og óhoyrdu evni hansara at samspæla við álopsmakkaran Wayne Rooney, ið kanska hava imponerað mest av øllum.

Hesir eginleikar hava samlað vunnið honum ovasta pláss á Actim Index styrkislistanum, millum spælarar í Premier League í heyst.

Tevez hevur otað seg fram á fremsta pláss, frammanfyri Cesc Fabregas hjá Arsenal, og merkisverda og dugnaliga Benjani Mwaruwari frá Portsmouth. Rio Ferdinand og Cristiano Ronaldo eru eisini millum tíggju teir bestu, á ávíkavist áttanda og níggjunda plássi.

## FAKTA

**ACTIM INDEX' TOPP 10**

Stigini á talvuni eru baserað á mál, skot, offsidestøður, avleveringar, tacklingar, blokeringar, burturspørk og nøgd av fríspørkum.

| | Spælari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Carlos Tevez | Manchester U | 316 |
| 2 | Cesc Fabregas | Arsenal | 310 |
| 3 | Benjani Mwaruwari | Portsmouth | 297 |
| 4 | Martin Petrov | Manchester C | 286 |
| 5 | Frank Lampard | Chelsea | 282 |
| 6 | Gabriel Agbonlahor | Aston Villa | 279 |
| 7 | Emmanuel Adebayor | Arsenal | 276 |
| 8 | Rio Ferdinand | Manchester U | 275 |
| 9 | Cristiano Ronaldo | Manchester U | 271 |
| 10 | Gael Clichy | Arsenal | 267 |